# Smiðjan frálíkt listaumhvørvi



HØLI OG LIST
*Jan Müller*

*Við málningunum hjá Høgna Larsen við motivum úr havnagøtum kemur Smiðjan í Lítluvík í hjartanum á gomlu Havnini veruliga til sín rætt.*

*Mynd Álvur Haraldsen.*

Tað var tann tíð, tá tosað varð um, hvat gamla smiðjan í Lítluvík kundi brúkast til. Endin varð, at hon burturav gjørdist framsýningarhøli hjá listafólki. Og tey eru mong, sum ár um dag hava víst fram verk síni fyri ikki at siga lívsverk síni í hesi gomlu, søguligu og hugnaligu smiðjuni.Og fyri Høgna Larsen, listamann kemur júst Smiðjan sera væl við og eisini til sín rætt. At vísa fram akvarellmálningar av mongu gomlu gøtunum í Havnini t.d. Konradsbrekkuna í sjálvum hjartanum í gomlu Havnini skuldi passa sum fótur í hosu. Og Høgni hevur bara gott at bera hesum frálíka framsýningarhølinum við sínum serstøku og dámligu hvítkálkaðu grótveggjum. Ja í sær sjálvum er Smiðjan eitt listaverk. Hon er júst málað innan, gólvið er fernicerað og er hon sum nýggj. –Tað er ein sonn uppliving at kunna sita her í Smiðjuni og saman við havnafólki tosa um Havnina og tær gomlu gøturnar. Tað snýr seg ikki bert um list. Tað er so sanniliga eisini søga. Øll hava okkurt uppá hjartað og kenna seg aftur í málningunum. Hetta er jú teirra heimliga umhvørvi sigur listamálarin, sum eisini heldur Havnina vera eitt frálíkan pall á arbeiða á hjá einum listamanni. Framsýningin er opin leygardagin og sunnudagin aftrat frá kl. 14 til 19.

# Klaksvíkingur tippar

Klaksvíkingurin, Kristian Joensen, er ein av ágrýtnu og dugnaligu tipparunum í Føroyum. Hann luttekur, sum tann einasti føroyingurin, í eini kapping á heimasíðuni hjá Dansk Tipstjeneste. Teir eru níggju luttakarar, og nú átta hava tippað, liggur Kristian Joensen á odda.

Vinnarin av hesi kapping fær, umframt tann heiðurliga tittulin ”Ugens Gæstetipper”, ein fótbóltsdyst, eftir egnum ynski, í Premier League í Englandi.

Um Kristian skuldi verið so heppin at vunnið, so ætlar hann sær at hyggja eftir einum dysti á Anfield Road, sum er heimavøllurin hjá Liverpool.

***-sae-***



*Kristian Joensen liggur væl fyri í kappingini*


## Starvsfólk til Avrokningardeildina




Til okkara avrokningardeild verður søkt eftir fólki at byrja 1. mars 2002 ella skjótast gjørligt. Á avrokningardeildini starvast 9 fólk. Høvuðsuppgávurnar á avrokningardeildini eru debitorbókhald, debitorrøkt og innheintingarmál.

Uppgávan hjá tí, sum sett/ur verður, er serliga at vera við í menningini av debitorrøktini hjá Føroya Tele og annars at vera við í øðrum uppgávum á avrokningardeildini. Talan er um krevjandi og avbjóðandi starv.

**Tín førleiki**
Tann, ið sett/ur verður, skal hava skrivstovu-, peningastovns- ella hægri búskaparfrøðiliga útbúgving. Dentur verður lagdur á, at viðkomandi hevur royndir frá arbeiði við debitorum og leggur stóran dent á, at geva viðskiftafólki okkara eina góða tænastu. Somuleiðis skal viðkomandi kunna taka ábyrgd, arbeiða sjálvstøðugt og vera opin.

**Tað er eisini ein fyrimunur at hava**
· EDV førleika (á brúkarastøði)
· merkonom, HH, HA ella aðra viðkomandi útbúgving
· góðan røkjuskap
· góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi yrkisfelag.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Jákup Danielsen, deildarleiðara, lokal 3370 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. februar 2002.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Fjarskiftisøkið er í stórari menning og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum.**

FØROYATELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*




# Vit hitta fólk á gøtuni

ÚTSØLA
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Vit hava hitt fýra fólk úti á gøtuni og spurt, um tey ganga nógv á útsølu

**Erna T. Sigurðsson,**
**23 ára gomul**



- Jú, eg plagi altíð at fara ein túr, men sum oftast endi eg við at keypa okkurt, sum ikki er í útsølu.

Eg fari út fyri at finna onkrar skógvar ella klæðir, og plagi eg at nýta millum 400 og 500 krónur.

Eg fari á útsølu hvørt ár, men sum sagt endi eg altíð við at keypa okkurt av tí nýggja, sum handlarnir hava fingið, heldur enn av útsøluvørunum. So eg spari ikki nógvan pening av hesum...

**Allan Poulsen,**
**27 ára gamal**



- Eg havi ikki verið á útsølu enn, men ætli mær at keypa okkurt í vikuskiftinum. Eg fari út fyri at finna mær onkur klæðir, og møguliga okkurt annað eisini.

Eg plagi sum oftast at ganga á útsølu, men vil ikki siga, at útsølan er hæddarpunktið í mínum lívi.

Síðsta ár brúkti eg eini 1.500 krónur á útsøluni, men um eg fari at nýta eins nógv í ár, tað veit eg ikki enn.

**Armgarð Balsa,**
**46 ára gomul**



- Jú, eg plagi sum oftast at fara út í býin ein túr, tá handlarnir fara í útsølu. Eg fari fyri at finna mær onkur klæðir, og komi altíð heimaftur við einum ella øðrum.

Hvussu nógv eg brúki, veit eg ikki. Tað er so ymiskt frá ári til ári.

**Karl Martin Samuelsen,**
**44 ára gamal**



- Eg hugsi ikki so nógv um útsølu; eg fari heldur út at keypa, tá eg havi brúk fyri onkrum nýggjum.

Eg eri júst liðugur at lesa til pedagog, og fái prógvið handað í morgin, og tí eri eg í býnum og keypi klæðir í dag. Ein skuldi jú helst verið eitt sindur snøggur á einum slíkum degi...

Eg fór út fyri at finna einar skógvar og eina skjúrtu, og skógvarnar fann eg í eini útsølu, so har spardi eg nakrar krónur. Men sum sagt er tað ikki útsølan, sum hevur fingið meg í býin í dag.

# Tekniski Skúlin undir nýggja lærugrein

**Tekniski Skúlin í Klaksvík kann komandi skúlaár bjóða nemingunum at fara undir eina nýggja Meedie & Kommunikation breyt.**




*Í løtuni ganga umleið 80 næmingar á Tekniska Skúlanum í Klaksvík*

ÙTBÚGVING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Í 1936 varð sjálvsognarstovnurin Tekniski Skúli í Klaksvík settur á stovn. Endamálið var at leggja lunnar undir eini skipaðari undirvísing, soleiðis at handverki í økinum kundu koma upp á norðurlenskt høpi.

Nógv vatn er runnið í ánna síðan tá, og er skúlin í dag skipaður sum ein tekniskur studentarskúli.

### Nógvir møguleikar

À skúlanum hevur tú møguleika at fara undir tí trý ára longu HT útbúgvingina. Útbúgvingin er ætlað teimum, ið hava áhuga fyri at arbeiða við tøkni, bæði verkliga og ástøðiliga.

Ella tú kanst fara undir SIT, sum er ein eitt ára long støðisútbúgving innan tøkni.

Harafturat tekur skúlin eisini ímóti handverkaralærlingum á El-, Maskin-, og Timburdeildini.

Í august 2002 byrja 50 nýggir SIT og HT næmingar á skúlanum, umframt 25 nýggir lærlingar. Hetta er størsta tilgongdin nakrantíð.

### Ymsar breytir

Sum er hevur skúlin tríggjar breytir at bjóða næmingunum á SIT og HT útbúgvingunum.

Hesar eru Design & Produktion, Eneri & Bygning og Evnisgongd og Matvøra.

Hetta eru breytir, ið SIT næmingarnir allir sleppa at royna, meðan tú sum HT næmingur velur teg inn á eina av breytunum, og nýtir 12 tímar um vikuna á hesi breyt.

### Nýggj breyt á skránni

Í august mánað fer Tekniski Studentarskúlin undir enn eina breyt. Hendan breyt verður nevnd Medie & Kommunikation, og er ætlað teimum, sum hava serligan áhuga fyri miðlum, sum til dømis grafiskum forritum og alnótini.

Saman við Evnisgongd og Matvøru fer skúlin sostatt nú at hava tvær sokallaðar bleytar breytir av bjóða næmingunum.

- Vit byrjaðu at fyrireika okkum til hesa breyt áðrenn jólini. Millum annað hava vit vitjað fýra skúlar í Danmark, ið allir hava Medie & Kommunikation sum breyt, og koma vit ta fyrstu tíðina at hava tætt samband við Tekniska Skúlan í Odense. Tey skipaðu teirra breyt eftir sama leisti, ið vit hava hugsað okkum at gera her, og koma tey tí at hjálpa okkum í gongd, greiðir Pól Laksáfoss frá.

Pól kemur saman við Linjon Jacobsen at hava ábyrgdina av, at breytin kemur at koyra sum hon skal.

- Endamálið er at læra næmingarnar eitt sindur um samskifti. Hetta verður gjørt við fyrst at finna útav, hvønn móttaka ein ynskir, og síðani hvønn boðskap, ein skal senda til móttakaran. Tá hetta er funnið, skal næmingurin finna útav, hvønn miðil hann skal nýta til endamálið; tað kann so verða vikubløð, loftmiðlar ella alnótin.

Næmingurin skal eisini gera fýra verkætlanir ígjøgnum árið, harav tvær verða gjørdar í bólkum, sigur Pól víðari.

### Nýtt høli

Av skúlanum frætta vit, at bæði lærarar og næmingar eru sera spentir at fara í gongd við hesa nýggju breyt.

Í løtuni verða nýggj høli innrættað, ið skulu nýtast sum verkstað til projektarbeiði viðvíkjandi Medie & Kommunikation breytini.

# Føstulávints-tiltak í Klaksvík

**Klaksvík:** Í dag skipar Klaksvíkar Hornorkestur fyri tunnusláttri í KÍ høllini. Har verða ikki minni enn tíggju tunnur. Tiltakið er afturvendandi og verður skipað soleiðis, at børnini verða flokkað eftir aldri til hvørja tunnu. Tað eru altíð nógv børn í barnagarðsaldri og barnaskúlanum, men tá tað kemur upp móti framhaldsdeildini, minkar skjótt.

- Vit hava havt tunnu hangandi til framhaldsdeildina hvørt ár, og tá hava páparnir onkuntíð sligið hana, sigur Andrass Sólstein, formaður í Klaksvíkar Hornorkestri.

Har verður tó ikki bara tunnusláttur. Silvi kemur á vitjan og skipað verður eisini fyri stórum køkutombola. Tað kostar 20 krónur at koma inn.

Um kvøldið verður so dansur í Skálanum, har Eiler og Øggi við orkestri spæla. Andrass Sólstein, sigur, at teir plagdu at hava gamlamannadansin í KÍ høllin, men tíðin er farin frá hesum. Nú eru trý ár síðani, teir seinast høvdu dans í høllini, og tá vóru einans 250 fólk. Tað kemur alt ov lítið fólk og harvið inntøkur, samanborið við útreiðslurnar.

*-sae-*


## Landsfundur Sambandsfloksins 2002

**verður í Læraraskúlahøllini**
**fríggjakvøldið 15. og leygardagin 16. mars**

*Fundarskrá samb. viðtøkunum*

Leygarkvøldið kl. 19.30 verður veitsla í HB-húsinum. Tekning til veitsluna á tlf. 318870.
Kostnaður fyri veitsluna: 100 kr.

*Øll sambandsfólk eru vælkomin*

**Landsnevndin**